TIL **ARBEIÐIS**



FAKTA **EYÐGUNN SAMUELSEN**

**Arbeiðspláss:** Føroya Løgting

**Starv:** Tingfólk

**Besta við starvinum:** At vera við til at taka avgerðir

**Ringasta við starvinum:** Ov lítil planlegging

**Starvsstíð:** Tvey ár

**MYND:** JENS KRISTIAN VANG

# OFTA **ÓVÆNTAÐ** DAGSSKRÁ

**EYÐGUNN SAMUELSEN** TRÍVIST VÆL Í ARBEIÐINUM SUM **LØGTINGSFÓLK**, SJÁLVT UM **ARBEIÐSDAGARNIR** MANGAN ERU LANGIR



**TIL ARBEIÐIS**
Randi Jacobsen
randi@sosialurin.fo

Klokkan er 9.15, og Eyðgunn Samuelsen, umboð fyri Javmaðarflokkin er júst komin til Havnar. Vanliga fer hon við Bygdaleiðum úr Klaksvík til Havnar, men henda dagin er hon komin við bili.

– Mær dámar so væl at fara við bussinum, tí tá fái eg fyrireikað meg og gjørt notatir á vegnum suður, sigur Eyðgunn Samuelsen.

Henda dagin er hon komin so tíðliga suður, tí hon skal á fund í fíggjarnevndini klokkan 9.30.

Hesin fundurin má vera liðugur klokkan 11, tí tá er tingfundur.

– Í dag eru munnligir fyrispurningar á skránni. Eg havi ein fyrispurning, og tí má eg vera á fundinum, men tað eri eg annars altíð, sigur Eyðgunn Samuelsen.

Hon hevur nógv um oyruni. Hon er býráðslimur í Klaksvík, og ein mikudagin um mánaðin kann hon ikki fara á tingfund, tí tá er fundur í fíggjarnevndini í Klaksvík, og har noyðist hon at vera við.

## Altíð til arbeiðis

– Eg møti annars altíð, tá ið tingfundur er. Tað er jú mítt arbeiði, og sjálvt um eg havi míni áhugamál, fylgi eg væl við øðrum málum eisini. Tá ið eg eri framsøgufólk, má eg sita inni á tingfundinum alla tíðina, ella um eg taki orðið.

Myndir tiknar í tingsalinum vísa ofta, at har sita bara nøkur fá fólk. Men tað merkir ikki, at hini øll skulka.

– Tá ið eg ikki havi nakran leiklut á sjálvum tingfundinum, siti eg altíð í flokshølum okkara og lurti. Har er meira friður, og eg fái gjørt nógv annað, samstundis sum eg lurti. Í tingsalinum fái eg einki annað gjørt enn at lurta. Fleiri tingfólk gera líka sum eg.

Eyðgunn Samuelsen er limur í bæði fíggjarnevndini og í mentanarnevndini. Fíggjarnevndarfundirnir eru ofta drúgvir, og teir fundirnir eru sjáldan, meðan tingfundur er.

## Langir arbeiðsdagar

Nokkso ymist er, hvussu langir tingfundirnir eru. Týsdagin vardi fundurin til klokkan 18, og tað er heilt vanligt.

Handa dagin skal hon á starvsnevndarfund í flokkinum kl. 15. Kanska verður eisini fundur í tingbólkinum.

Eyðgunn Samuelsen hevur valt at undirvísa eitt sindur, samstundis sum hon er tingfólk.

– Eg havi seks undirvísingartímar um vikuna, men tað kann standa á at klára teir, tí knappliga kemur okkurt politiskt arbeiði upp ímillum. Tað eitur, at vit kunnu hava hálvt starv við síðuna av tingarbeiðinum, men tað er fyllkomiliga ógjørligt, um politiska arbeiðið skal røkja til fulnar. Og tað ber als ikki til, tá ið man sum eg ikki búgvi í Havn.

Hon hevur valt at undirvísa eitt sindur, bæði tí henni dámar tað, og tí hon ikki vil missa sambandi við fakið og við fólkini á skúlanum. Undirvísing hennara er manamorgun og fríggjamorgun, og vanliga fer hon teir dagarnar beint til Havnar, tá ið hon er liðug at undirvísa.

## Nógv at lesa

Tá einki tingarbeiði er, brúkar Eyðgunn Samuelsen alla sína tíð til at lesa og seta seg inn í tingmál. Nógv er at lesa, men tað fellur Eyðgnn Samuelsen lætt, tí hon er so roynd í at lesa, men tað tekur nógva tíð at seta seg inn í øll málini, og hon leggur dent á altíð at vera væl fyrireikað. Tað politiska arbeiðið er hjá henni í fulltíðar arbeiði og meira enn tað.

Ein skrá verður løgd eina viku fram fyri, nær tingfundir eru, men ofta kemur broyting í skránna. Viðhvørt verður við stuttum skotbrái kallað til nevndarfundar, og tað hendir av og á, at boð koma um kvøldið, atdagsskráin fyri dagin eftir er broytt, og eitt annað mál er á skránni. Tá er einki at gera uttan at seta seg at lesa alt kvøldið, sigur Eyðgunn Samuelsen.

Hon kundi hugsað sær, at tingarbeiðið var betur lagt til rættis, sjálvt um hon eftir at hava sitið í tinginum hevur vant seg við knappligar broytingar.

Eyðgunn Samuelsen letur væl at Løgtinginum sum arbeiðspláss, tí sjálvt um fólk ikki altíð eru so samd, tosa tey øll væl saman.

Hon heldur, at tingarbeiðið má vera torført at røkja hjá fólki við smábørnum, tí klokkan heldur ongantíð. Væntað verður, at ein fundur verður liðugur klokkan 16, men hann verður drúgvari enn so.

– Vit vita ongantíð, nær vit hava frí, og tí er ógjørligt at binda seg til nakað annað um kvøldið.

Eyðgunn Samuelsen gremur seg ikki, tí hon er uppvaksin í politiskum umhvørvi, fór upp í javnaðarfelagið í Klaksvík í 1987 og hevur sitið í Klaksvíkar býráð síðan 1998. Hon hevur politikk í blóðinum.